# JOHN's

KARVATOFTIR — FUGLAFJØRÐUR

## LIVANDI TÓNLEIKUR
HVØRT VIKUSKIFTI

## ALTÍÐ PUBQUIZ
LEYGARKVØLD KL. 22

## OG VIT VÍSA SJÁLVANDI DYSTIRNAR!

OPIÐ: FRÍGGJADAG 19–04 — LEYGARDAG 17–04 — SUNNUDAG 17–23

FYLG VIÐ Á FACEBOOK / JOHN'S Í FUGLAFIRÐI


Vælkomin til dyst í Fløtugerði



HAVSBRÚN

**Leikskrá nr.6**

NES SÓKNAR NSÍ 1957 ÍTRÓTTARFELAG

Hósdagur 12. mai 2016

effo deildin

Mynd: Sigmar Mørkøre

# Dysturin í dag

Birgir Petersen
ábyrgdarblaðstjóri



Vælkomin til Effodyst á Fløtugerði í Fuglafirði. Í dag taka vit ímóti NSÍ, sum eru stagneraðir eitt sindur seinastu tíðina eftir at teir fingu eina fína byrjan uppá kappingina. Hóast hetta, leiktu teir seg trygt víðari í steypakappingini móti Eb/Streymi um vikuskifti. So spurningurin er um teir eru við at fóta sær aftur.
Pól Johannus Justinunssen hjá NSÍ sigur at teir flestu av teirra leikarum eru tøkir burtursæð frá karantenuna hjá Per Langaard, sum hann fekk fyri beinleiðis reytt kort í hólmgongu við Arnar Dam hjá Eb/Streymi. Vónirnar hjá honum restina av kappingarárinum eru góðar, og tann lítillátni landsliðsleikarin dylir ikki fyri at teir droyma um gull við Løkin.
Um steypakappingina og lutakastið mánakvøldið sigur hann at tað ikki hevði so nógv at siga, hvat lið teir trektu, tí teir skula í finaluna. Óiva ætla teir at vaska tapið í finaluni í fjør av sær.
Nú eitur okkara venjaratoymi Jákup pluss Símun, og er okkara vón at hetta samstarv kemur at eydnast væl. Símun hevur gingið mangan brattan fyri ÍF og gleða vit okkum at merkja hansara positiva og konstruktiva máta at leiða okkara hóp uppá. Jákup hevur annars staði við ábyrgdini 2 teir seinastu dystirnar, ið sum kunnugt hava givið fulla úrtøku. Nú er at vóna at vit klára at halda tað góðu gongdina koyrandi og venda keðiligu trendini seinastu árini móti NSÍ, har vit hava spælt fínt, men alt ov ofta hava staði við ongum við dystarenda

Koyri á drongir.

*Birgir*

Í 2015 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4 | 22-03-2015 | NSÍ-ÍF | 3-1 |
| 10 | 08-05-2015 | ÍF-NSÍ | 0-3 |
| 19 | 03-08-2015 | NSÍ-ÍF | 5-1 |

Í 2014 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4 | 13-04-2014 | ÍF-NSÍ | 2-1 |
| 14 | 21-06-2014 | NSÍ-ÍF | 2-2 |
| 27 | 25-10-2014 | NSÍ-ÍF | 4-2 |

Í 2013 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | 12-05-2013 | ÍF-NSÍ | 3-3 |
| 18 | 04-08-2013 | NSÍ-ÍF | 3-2 |
| 26 | 20-10-2013 | ÍF-NSÍ | 3-1 |

Í 2012 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 25-03-2012 | ÍF-NSÍ | 2-1 |
| 18 | 05-08-2012 | NSÍ-ÍF | 1-2 |
| 24 | 16-09-2012 | ÍF-NSÍ | 3-1 |

Í 2011 gekk tað soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7 | 12-05-2011 | NSÍ-ÍF | 1-2 |
| 16 | 14-08-2011 | ÍF-NSÍ | 1-1 |
| 22 | 19-09-2011 | NSÍ-ÍF | 1-2 |

ÍF
530 Fuglafjørður · Tel 444 636
Fax 444 634 · if@if.fo www.if.fo

LEIKSKRÁIN:
Útgevari: ÍF-fótbóltur
Ábyrgd: ÍF fótbóltur / Birgir Petersen
Uppsetan: Hildur Høghamar

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Box 81 • 530 Fuglafjørður • tel. 414400 • fax 414401
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

# Tippikapping

Tippikapping Aftur í ár fara vit at hava eina tippikapping, har tú hevur møguleika fyri at tippa komandi umfar í effo deildini, umframt ein av málskjúttunum pr. dyst. Reglurnar fyri at luttaka eru sera einfaldar: Tú tippar allar dystirnar, umframt at tú skrivar navnið á einum leikara, ið tú væntar megnar at skjóta eitt mál. Skriva síðan navn og telefonnummar á seðilin, og lat hann inn í kioskina í ítróttarhúsinum seinasta lagi 15 minuttir eftir at dysturin í dag er liðugur. Lutakast verður síðan ímillum teir seðlar, ið hava flest rætt svar. Drigið verður fyri hvønn triðja heimadyst, og verður vinnarin uppringdur.

| Heimalið | Útilið | 1 | X | 2 | Málskjútti |
|---|---|---|---|---|---|
| NSÍ | Skála | | | | |
| AB | TB | | | | |
| KÍ | HB | | | | |
| B36 | B68 | | | | |
| **Víkingur** | **ÍF** | | | | |
| Navn: | | | | | |
| Telefonnummar | | | | | |





**Eitt trygt grundarlag**

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkaraarbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo



NORÐOYA SPARIKASSI





www.ns.fo

Netbankin
sum app
skanna kotuna

Ert tú lesandi í Føroyum ella uttanlands, er lætt at avgreiða fíggjarligu viðurskifti tíni í Norðoya Sparikassa.

Bílegg eitt ungdómsprát á tel. 47 5000

UNG 13-25 NemKonta Netbankin Gjaldkort Ráðgeving

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

Linde Gas AGA

FØROYA GASSØLA

Ídnaðar- og propangass
Skeriútgerð
Sveisiútgerð
Hitaovnar
Gassútgerð
Stórkøksútgerð
Køligass

Opnigstíðir:
Mána. - Fríggjadag
8:00 - 17:00
Tlf. 315544
e-mail: gassola@gassola.fo

www.gassola.fo

Grein



# Litplakatin...

Eli Hentze

Smádrongurin klipti alt úr bløðunum, ið hevði við fótbólt at gera. Hesin hugurin byrjaði seinnu helvt av 70´árunum. Í Fuglafirði var hávaksin svii komin til róðrið, og í 1979 bragdaði. Gullkrónurnar, tær fyrstu og einastu.....higartil, hingu nú um hálsin á Abraham Hansen, Jan Nielsen, Birgir Thomsen, Meinhard Dalbúð og øllum hinum, ið eg sjálvandi kendi nøvnini á. Í einum av myndabløðunum var seinni ein plakat av FM-vinnarunum anno 1979, og enntá í litum. Hana goymdi eg sum reyðargull. Hugdi at henni, hevði hann uppi á vegginum saman við øðrum plakatum av Allan Simonsen, Kevin Keegan, Johan Cruyff, Liverpool, Barcelona og øðrum. Droymdi helst um, at einaferð kundi eg eisini avmyndast í litum við gullkrónum um hálsin. Í einum av mongu tíðindabløðunum, ið ríkaðu dagligdagin fyrr, vóru eisini lítlar myndir av hvørjum einstøkum FM-vinnara úr Fuglafirði. Tær klipti smádrongurin eisini út og goymdi. Hann eigur tær enn!

Nøkur ár seinni, í 1984, var dagligdagurin aftur tann vanligi í Fuglafirði. Onkrir av stuðulsleikarunum frá magiska 79-liðnum vóru nú í Danmark í útbúgvingarørindum. Í Hvalba bíðaðu øll í spenningi eftir søguligum sigri og ikki minst borðhaldi. Í Vági var 14 ára gamli smádrongurin, sum nú bara bíðaði eftir løtuni, tá ið hann kundi lata seg í gul/bláa vaksna búnan og vinna sigrar fyri sítt lið, á vitjan saman við vinmanni. Teir vildu vera til staðar, tá ið B71 vann 3.deild. Í kolandi ódn vunnu vábingar 2-1, og dreymurin um uppflyting var brostin. Á grasinum í Hvalba køvdi heimkomni útsetin Dalbúð vóna hvalbinga um fyrstu uppflytingina í ovastu deildina, og borðhaldið mikla, ið boðað varð um frammanundan, gjørdist herskin biti.

At ferðast er lívið, hevur oftani verið skrivað! Nú hava vit ferðast eina lítla stund í tíðarinnar maskinu, ferðast aftureftir, verið á vitjan hjá Dalbúð og øðrum. Fortalt verður, at frálíki enski vongspælarin, Stanley Matthews, dugdi so væl at avlevera innfyri málið, at álopsleikararnir altíð sluppu undan at raka lissuna, ið knýtti bóltin saman fyrr í tíðini, tá ið teir skallaðu móti málinum. Í Fuglafirði verður fortalt, at høgi álopsleikarin Meinhard Dalbúð eins og eitt annað Bábilstorn, rakk so langt upp móti skýnum, at um bert bólturin var nóg høgt uppfrá, tá ið sparkað bleiv innfyri, so kom hann í høvdið á Stóra og í mál! Søgurnar eru so nógvar tó.....

Anno 2016 er 1.lið felagsins í fremstu røð! Tíðum hevur felagið ferðast millum tær báðar ovastu deildirnar, og verið í onkrum einstøkum steypafinalum, tó uttan sigur. Flogbóltssigrarnir eru nógvir, sigursvant flogbóltsfelag. Hví tá ikki á grøna grasinum?

Í stuttum tykir mær, og tað havi eg altíð hildið, at fótbóltsspælarin í Fuglafirði aloftast var og er góður, men kanska er tørvur á eitt sindur av tí góða "tramansskapinum" á vølli, ið at kalla altíð hevur eyðkent nábúgvan, sum nú eitur Víkingur!

Litplakatin liggur í eini pappeskju uppi á ovastalofta saman við øllum hinum plakatunum, ið riggaðu so væl sum tapet barnaárini, men hon er har enn!

Góða eydnu við fótbóltinum í Fuglafirði og góðan dyst!

# Tips 13

Tips 13 er kapping, har ein leikari og ein fjeppari fáa 13 fótbóltsspurningar, og hava tey/teir 3 valmøguleikar pr. svar. Hvør spurningur gevur 1 stig. Spælt verður eftir "vinnarin sitir"-leistinum. Ein leikari luttekur hvørja ferð, og spælir hann í móti einum, ið á ein ella annan hátt, hevur okkurt við ÍF at gera. Verður svarað skeivt uppá spurningar, sum beinleiðis hava við ÍF at gera, telur tað hálvt minusstig. Endar tað við javnleiki, verður eykaspurningur gjørdur, ið hevur eitt talvirði. Vinnarin er so viðkomandi, ið gitir nærmast rætta svarinum.

Heri vísir seg at vera einaráðandi á økinum, og hann vann sannførandi 8,5-5,5 á liðskiparanum í dag. Samlaða úrslitið er nú 6-0 til Hera, og kemur hann aftur at dystast móti einum leikara til komandi dyst. Heri og Jan valdu at seta eitt lítið glas uppá spæl, og tað streyk Heri avstað við. Teir høvdu hvør sín ÍF spurning skeivan, og má hetta sigast at koma sum eitt sjokk, at hagtalsmaðurin í Gjógvará skeyt viðsíðunar av her.

Um tú vilt vita tey røttu svarini, so standa tey niðast á hesi síðuni.

| Nr. | Spurningur | 1 | X | 2 | JÓE | HHN |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Hvør er nummar 10 hjá Newcastle United? | Yoan Gouffran | Ayoze Pérez | Siem de Jong | 1 | 1 |
| 2 | Hvat enskt Premier League felag umboðaði Thomas Helveg? | Aston Villa | Norwich | West Ham | 1 | 1 |
| 3 | 16. august í 2000 spældu Føroyar landsdyst móti Danmark á Tórsvølli. Úrslitið bleiv 0-2. Hvørjir skutu donsku málini? | Ebbe Sand og Brian Steen Nielsen | Thomas Gravesen og Jon Dahl Tomasson | Henrik "Tømrer" Pedersen og Claus Jensen | -0.5 | -0.5 |
| 4 | Hvør av hesum hevur skotið flest mál fyri besta liðið hjá ÍF? | Magni á Lakjuni | Høgni á Lakjuni | Bárður á Lakjuni | 1 | -0.5 |
| 5 | Úr hvørjum felag keypti Real Madrid Martin Ødegaard? | Strøms-godset | Vålerenga | Stabæk | 1 | 1 |
| 6 | Hvat av hesum feløgum er yngst? | NSÍ | AB | Royn | 0 | 1 |
| 7 | Til hvat felag seldi Chelsea Mateja Kezman? | Atletico Madrid | Fenerbahce | Paris Saint-Germain | 1 | 1 |
| 8 | Hvussu nógv reyð kort hevur Rúni E. Elttør fingið fyri ÍF? | 1 | 2 | 3 | -0.5 | 1 |
| 9 | Hvør var, av UEFA, valdur til besta leikara í EM 2008? | Andrés Iniesta | Xavi | David Villa | 0 | 0 |
| 10 | Hvør av hesum er elstur? | Nicky Butt | Gary Neville | Paul Scholes | 0 | 0 |
| 11 | Hvør skeyt fyrsta málið, sum ÍF fekk í 2012? | Bartal Eliasen | Simon Skibsted | Clayton Soares | 1 | 1 |
| 12 | Hvat av hesum feløgum hevur Sebastian Giovinco ikki umboðað? | Empoli | Sampdoria | Parma | 0 | 1 |
| 13 | Hvussu nógvar landsdystir hevur Kevin Phillips spælt fyri England? | 6 | 8 | 10 | 0 | 0 |
| | | | | | 5,5 | 8,5 |

Rætt svar: 2 – X – 1 – 2 – 1 – X – 1 – 2 – X – 2 – 1 – X – X




Fuglafjarðar kommuna hevur eina sera livandi heimasíðu. Har er m.a.

- Svartatalva
- Barnaverndin
- Brandstøðin
- Fuglafjarðar skúli
- Barnaansing
- Eldrarøkt
- Kunningarstovan
- Ruskøkið
- Leið 410
- Frítíðarskúlin
- Læknin
- Sosiala deild

...og nógvar aðrar tænastur

Fuglafjarðar kommuna


usedbaader.biz
BAADER service
OG SMIÐJUARBEIÐI
Okkara vælútgjørda smiðja niðan fyri Bedingina í Fuglafirði megnar allar vanligar smiðjuuppgávur, stórar sum smáar.
Umframt sjálva smiðjuna hava vit stóra goymslu við rustfríum tilfari, ketum, legum, gearum, motorum o.s.fr.
Ring til okkara á 775 775, ella vitja okkara heimasíðu: www.pl.fo fyri at fáa meira at vita.
BAADER
fomaco
Ubro SystemPac
euskan++
Tel 775 775
www.pl.fo
peturlarsen


CAPTO
TIL FLÓTITROL
RÆTTILIGA FANGANDI
CAPTO er ein nýggjur nettráður til flótitrol sum VÓNIN hevur ment.
Set teg í samband við okkum fyri at hoyra meira. Sí www.vonin.com
VÓNIN®


Vit gera
– vegir
– gongubreytir
– tún
– parkeringsøkir o.a.
Vit planera og fresa eisini
www.hj.fo
HJ ASFALT SP/F
Postsmoga 28 | FO-700 Klaksvík | Faroe Islands | Tel. 458800 | Fax 458801
Heri Jacobsen | Fartøl. 227910 | Jóhannes Rasmussen | Fartel. 220179


Kloakk og vatn · hiti og sanitet · alt til baðirúmið
SK
SVENDKROSSTEIN
Pf. Svend Krosstein · Falkavegur 6 · Postboks 3229 · FO-110 Tórshavn
Tel. +298 344 600 · Fax +298 344 601 · www.krosstein.fo · krosstein@krosstein.fo
SENDISTOVAN

# Hagtøl

## HETTA UMFARIÐ:

| | |
|---|---|
| 12/5/16 | B68-Víkingur |
| 12/5/16 | Skála-KÍ |
| 12/5/16 | AB-B36 |
| **12/5/16** | **ÍF-NSÍ** |
| 12/5/16 | TB-HB |

## KOMANDI UMFAR:

| | |
|---|---|
| 16/5/16 | NSÍ-Skála |
| 16/5/16 | AB-TB |
| 16/5/16 | KÍ-HB |
| 16/5/16 | B36-B68 |
| **17/5/16** | **Víkingur-ÍF** |

## TOPP 10 MÁLSKJÚTTAR:

| Navn | Mál | Felag |
|---|---|---|
| Klæmint A. Olsen | 9 | NSÍ |
| Jóannes Bjartalíð | 7 | KÍ |
| Páll A. Klettskarð | 6 | KÍ |
| Filip Djordjevic | 6 | Vík. |
| **Adeshina A. Lawal** | **5** | **ÍF** |
| Sebastian Pingel | 4 | B36 |
| Róaldur Jakobsen | 4 | B36 |
| Árni Frederiksberg | 4 | NSÍ |
| Øssur M. Dalbúð | 4 | HB |
| **Bogi Reinert Petersen** | **3** | **ÍF** |

## MÁLSKJÚTTAR HJÁ ÍF:

| Navn | Mál |
|---|---|
| Adeshina A. Lawal | 5 |
| Clayton Soares do N. | 3 |
| Bogi Reinert Petersen | 3 |
| Andy Ó. Olsen | 2 |
| Dánjal á Lakjuni | 1 |
| Poul N. Mikkelsen | 1 |

## STØÐAN:

| Nr. | Lið | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 9 | 5 | 3 | 1 | 19 | 10 | 9 | 18 |
| 2 | KÍ | 9 | 5 | 2 | 2 | 18 | 10 | 8 | 17 |
| 3 | B36 | 9 | 5 | 2 | 2 | 17 | 9 | 8 | 17 |
| 4 | HB | 9 | 5 | 2 | 2 | 16 | 11 | 5 | 17 |
| 5 | NSÍ | 9 | 5 | 0 | 4 | 22 | 13 | 9 | 15 |
| **6** | **ÍF** | **9** | **4** | **2** | **3** | **16** | **21** | **-5** | **14** |
| 7 | Skála | 9 | 2 | 3 | 4 | 9 | 14 | -5 | 9 |
| 8 | TB | 9 | 2 | 2 | 5 | 6 | 14 | -8 | 8 |
| 9 | AB | 9 | 0 | 5 | 4 | 6 | 10 | -4 | 5 |
| 10 | B68 | 9 | 0 | 3 | 6 | 5 | 22 | -17 | 3 |

# Liðini í dag

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Poulsen | |
| 2 | Gunnar Christiansen | |
| 3 | Poul N. Mikkelsen | |
| 4 | Alex Jose dos Santos | |
| 5 | John Daniel Guðjónsson | |
| 6 | Karl A. Løkin | |
| 7 | Dánjal á Lakjuni | |
| 8 | Bogi R. Petersen | |
| 9 | Kristoffur Jakobsen | |
| 10 | Ari Ó. Ellingsgaard | |
| 13 | Hallgrím G. Hansen | (M) |
| 14 | Dánjal Pauli Højgaard | |
| 15 | Oliver Korch | (M) |
| 17 | Leivur Joensen | |
| 18 | Clayton Soares do Nascimento | |
| 23 | Andy Ó. Olsen | |
| 27 | Margeir Toftegaard | |
| 28 | Hanus Eliasen | |
| 30 | Adeshina A. Lawal | |
| 37 | Jan Ó. Ellingsgaard | (L) |
| 80 | Tóri T. Traðará | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari | Jákup Mikkelsen |
| Venjari | Símun Eliasen |
| Liðleiðari | Ólavur Larsen |
| Liðleiðari | Trúgvi Nesá |
| Liðleiðari | Dan Petersen |

NES SÓKNAR NSÍ 1957 ÍTRÓTTARFELAG

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Símun Rógvi Hansen | (M) |
| 2 | Per Langgaard | |
| 3 | Monrad H. Jacobsen | |
| 4 | Jens Joensen | |
| 5 | Jákup Andrias Gaardbo | |
| 6 | Andras Frederiksberg | |
| 7 | Jann Martin Mortensen | |
| 8 | Haraldur R. Højgaard | |
| 9 | Jonleif Højgaard | |
| 10 | Klæmint A. Olsen | (L) |
| 11 | Árni Frederiksberg | |
| 12 | Einar Tróndargjógv | |
| 13 | Pól Jóhannus Justinussen | |
| 14 | Nikolaj B. Køhlert | |
| 15 | Jóhan Jacobsen | |
| 16 | Petur Knudsen | |
| 17 | Jann Benjaminsen | |
| 18 | Magnus H. Olsen | |
| 19 | Mórits Heini Mortensen | |
| 23 | Jannik Olsen | |
| 25 | Jóhan Gaardbo | |
| 29 | Karstin Hansen | (M) |

| | |
|---|---|
| Venjari | Anders Gerber |
| Hjálparvenjari | Harry Knudsen |
| Liðleiðari | Andras Olsen |

Bóltstuðul er Fagranes

| | | |
|---|---|---|
| Dómari: | Petur Reinert | |
| Hjálpardómarar: | Jan á Líðarenda | Jan Andersen |
| 4. dómari: | Arni Rasmussen | |
| Eygleiðari: | Lassin | |


sponsored
by
INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur


Tróndur í Gøtu
Finnur Fríði
Leiðandi reiðarí
í norðurhøvum
Jupiter
Tummas T
Saksaberg
VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tlf: 610600
Faks: 441650 | vardin@vardin.fo | www.vardin.fo


pls.fo
SPORA BILIN
OG FÁ GLEÐI AV FYRIMUNUNUM
1. Minni slit av dekkunum
2. Lægri brennievnisnýtslu
3. Høgligari túrar
UPPMÁTING PR. AKSIL U/MVG 475,-
SPORING EFTIR AVTALU
RING 765 765
OG AVTALA TÍÐ
stórbilar
verkstaður & søla
Tel 765 765 · www.pls.fo

# VEST PACK

*...meira enn pakkitilfar!*

- Arbeiðsklæðir
- Kjølsvín
- Balliplast
- Oljusperringar
- Pakkimaskinur
- og meira afturat

Høvuðsvirkisøkið hjá Vest Pack er plast- og etikett framleiðsla. Seinnu árini hevur Vest Pack eisini verið heildarveitari av pakkitilfari og tí, sum fylgir í kjalarvørrinum av tí - tvs. at veittar verða eisini vørur, sum ikki eru partur av sjálvari framleiðsluni, so sum pappeskjur, blokkumsløg, pakkimaskinur osv.

Styrkin hjá Vest Pack er millum annað fleksibilitetur, eitt nú av tí, at vit hava framleiðsluna í húsinum og ikki hinumegin víða hav. Somuleiðis kunnu vit tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, eitt nú hvat víðvíkur nøgdum, har vit hava eitt lægri minstamark fyri serframleiðslu enn okkara kappingarneytar uttanlands. Vest Pack er ISO 9000 góðkent - eisini framleiðslan.

FO-350 Vestmanna · Faroe Islands · Telefon +298 42 41 07 · www.vestpack.fo

Allar vanligar umvælingar
Dekksøla
Viðlíkahald

**Bilverkstaðið á Kambsdali**
**Tlf. 441111**



# Ætlar tú at selja tíni hús í Fuglafirði ?

## - vit hava keyparar, ið bíða

Niels Finsensgøta 37
Tórshavn | Tel 348 900
inni@inni.fo | inni.fo

INNI

# Vitja handil okkara á Hjalla

Her fær tú alt innan vask og reingerð á einum stað



# KEMILUX

www.kemilux.fo



# Dómarin druknaði undir brúsuni...

Eli Hentze




Síðsta dagin í august mánaði í tí Harrans ári 2002 vitja Pauli Jarnskor og hansara ÍF-menn á Sandi til landskappingardyst í næstbestu deildini. Gøtumaðurin, ið vanur var við gullráka úr Sarpugerði, er nú spælandi venjari í Fuglafirði og á degnum eisini liðskipari.

FS Vágar eru einaráðandi í kappingini um 1. plássið, ið gevur beinleiðis uppflyting til heilaga landið á ovastu rók, meðan gul/bláu vertirnir og reyðu fuglfirðingarnir stríðast um 2. plássið, ið gevur rættindi at spæla 2 upp/niður-flytingardystir móti nr. 9 í bestu deildini. Undan dystinum er B71 á 4. plássi við 18 stigum, meðan ÍF er 1 stig aftanfyri á 6. plássið. Bert 1 stig upp til silvurkrónurnar. Kappingin er sera jøvn hetta árið. Bert 5 stig frá botnproppinum HB til annað plássið, ið KÍ liggur á eftir 13 umfør.

Stórvaksin og bringubrattur leirvíkingur skal leiða leik. Í 26. minutti noyðist hann av álvara í arbeiðshandskarnar. Tað prutlar av álvara undir lokinum eina løtu, hjá onkrum kókar yvir. Dímunarbóndin, Jógvan Jón Petersen, er heitur, og tað er pólski leikarin Slawomir eisini. Øsingin er somikið stór, at reyðu skortar teirra fult og heilt fella inn í landslagið, tá ið Skarðenni vísir báðum reyðlitaða kortið, ið merkir farvæl og takk. Mannfall hjá heimamonnum, ið næstu 64+ minuttirnar skal spæla 9 móti 11.

10 minuttir seinni eru vit á odda 1-0, ið eisini er støðan, til stórur tími er spældur. Fyrst javnar Hanus Eliasen og góðar 10 minuttir undan leikloki leggur gøtumaðurin teir reyðu framum. Tveir minuttir seinni er brotsspark í hinum endanum. Heimamaðurin við 14-talinum á rygginum er eirindarleysur og javnar úr 11-metrum til endaliga úrslitið 2-2. Minnisrík løta at fáa úrslit burturúr við bert 9 monnum móti fullmannaðum ÍF liði.

Dagurin gjørdist ikki minni minnisríkur, tá ið tað eftirfylgjandi fréttist, at dómarin var druknaður undir brúsuni. Gerningsmaðurin er ikki funnin enn, men menn/konur eru eisini langt síðani hildin upp at leita!

Tað líktist morði, ið hevði verið trupult at greitt. Undir rennandi brúsuni lógu klæði dómarans. Fyrst troyggjan/jakkin, síðani buksurnar og niðast hosurnar/skógvarnir. Alt køstvátt og í lummanum okkurt, ið ikki toldi vatn. Tað sá út sum dómarin eins og kavamaður var bránaður, vekk, forsvunnin í tíð og ævir. Tíbetur høvdu dómari og linjumenn tað gott og hava tað enn gott, men fyri B71 gjørdist dagurin dýrur. Tú sleppur ikki snikkaleysur at drukna dómaran! Nógvir túsundkrónulappar skiftu hendur!

Javnleikurin í 14.umfari var týdningarmikil fyri heimamenninar, sum við kappingarárslok ein lítlan mána seinni, endaðu 1 stig framman-fyri Paula og hansara menn, og vunnu sær rætt at spæla upp/niður-flytingardystir móti EB/Streymi.





Jógvan Weihe

Stiðjagøta 10 · FO-100 Tórshavn
Tel. 35 38 97 · Fax 35 38 98



Salong Halda.fo

Tel. 44 23 00
Stallagøta 13
512 Norðragøta

Opið er:

Mánadag 9.00 - 17.00
Týsdag 9.00 - 19.00
Mikudag 9.00 - 19.00
Hósdag 9.00 - 18.00
Fríggjadag 9.00 - 17.00
Leygardag 9.00 - 13.00
Opið er eisini eftir avtalu

Online booking
www.salonghalda.fo





teknistovan GØTA

Jens Kl. Jacobsen
Far.: jkj 232343
jkj@teknistovan.fo

Henning Olsen
Far.: ho 232344
ho@teknistovan.fo

510 Gøta, Gøtuv. 2, Tel.: 442344 - teknistovan@teknistovan.fo - www.teknistovan.fo






KSS
KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

GER SJÓLÍVIÐ LÆTTARI

KLAKSVÍKAR SLEIPISTØÐ

Kósaskákið 3 FO-700 Klaksvík Tel. +298 472030 Fax: +298 472031 T-postur: kss@kss.fo www.kss.fo


## 5 á Lakjuni

| Navn | Fyrsti dystur | Dystir | Mál |
|---|---|---|---|
| Bárður | 1995 | 151 | 47 |
| Magni | 1991 | 130 | 30 |
| Høgni | 1992 | 101 | 27 |
| Eyðun | 1980 | 61 | 14 |
| Jákup | 2006 | 1 | 0 |

## ÍF'arin



| | |
|---|---|
| Navn: | Durita Nielsen |
| Føðingardagur: | 16.09.1995 |
| Føðistað: | Tórshavn |
| Starv: | Bakkafrost |
| Pláss á vøllinum: | Miðja |
| Yvirtrúgv: | Fari altið í vinstru hosu fyrst |
| 3 orð sum lýsa teg: | Hatta fari eg aldrin at svara uppá! |
| Torførasti mótstøðumaður: | Heidi Sevdal. |
| Frítíðarítriv: | Fótbólt |
| Vónir fyri 2016: | Top 3 |

## Tín Ítrótt:

| | |
|---|---|
| Fyrsti dystur á 1.liðið: | 2010 |
| Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF: | 2013 |
| Aðrar ítróttargreinar: | Eingin |
| Minningarríkasti dystur: | Tað er nokk steypafinalan við ÍF í 2013. |
| Størstu fótbóltsliga ávirkan: | Komi ikki á nakran ávísan |
| Besti fótbóltsleikari: | Klæmint Olsen |
| Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt: | Hondbólt. |
| Hvat slag av venjing dámar tær best: | Sum so alt, har bóltur er uppi í |
| Hvat slag av venjing dámar tær ikki: | Renning |

## Tínir favorittar:

| | |
|---|---|
| Matur og drekka: | kylling og eina kalda kondi |
| Slag av tónleiki: | Playlistan hjá Sigrid í skiftirúminum |
| Sjónvarpssending: | Hyggi næstan ikki sjónvarp, uttan so tað er 3-2 |
| At slappa av: | Eg slappi bara av tá eg sovi |
| Troyggja nr.: | 9 |
| Besti fótbóltsleikari nakrantíð: | Cristiano Ronaldo |
| Sjónvarp/filmstjørna: | Har er fleiri |
| Besta bók/blað: | Tað veit eg ikki |
| Stuttligasti persónur: | Tað er ringt at takað støðu til |
| Stuttligasti í hópinum: | Dania A Olsen |
| Besti ÍF áskoðari: | Sigrid Petersen |

## Leikarafakta:

- Yndissangurin hjá henni er Knallert við Linse Kessler og Robert Garner
- Tónleikarin Jens Marni Hansen er mammubeiggi hennari
- Hevur samlað sær 3 reyð kort.
- Er íðin samlari av føroyskum fótbóltskortum
- Systir hennara spælir við B68, har hon eisini er liðskipari
- Er ógvuliga ruddilig, og trívist SLETT ikki í óruddi
- Hevur umboðað B68/NSÍ, ÍF og ÍF/Víking
- Hevur spælt 72 dystir í 1. deild, 11 í 2. deild og 14 í steypakappingini
- Hevur skotið 4 mál
- Hevur spælt ein landsdyst. Hesin var á U19 landsliðnum í 2012


Álvaskot
Fysioterapi
v/Álvur Hansen
44 51 44

VØRDSLAN
WEARHOUSE
"...klæðir og skógvar til hennara hansara og børnini, nú alt undir somu lon"





